MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **19. februar 2015**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 13/00631-27**

**Løgtingsmál nr. xx/2015: Uppskot til løgtingslóg um skúladeplar**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um skúladeplar**
**(Depilslógin)**

*Allýsing*

**§ 1.** Ein skúladepil er ein útbúgvingarstovnur undir landsstýrinum, sum eftir samanlegging av útbúgvingarvirksemi bjóðar út útbúgvingar sambært teimum í litra a-f nevndu løgtingslógum undir einari og somu leiðslu, sbr. § 5, stk. 1:

a) Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar við seinni broytingum,
b) løgtingslóg nr. 107 frá 29. desember 1998 um støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið,
c) løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar við seinni broytingum,
d) løgtingslóg nr. 41 frá 23. apríl 1999 um støðisútbúgving innan tøkni,
e) løgtingslóg nr. 49 frá 9. mai 2005 um stuttar framhaldsútbúgvingar á yrkisskúlum og
f) løgtingslóg nr. 22 frá 17. mai um yrkisskeið.

*Stk. 2.* Landsstýrismanninum verður heimilað í kunngerð at leggja aðrar enn tær í stk. 1, litra a-f nevndu útbúgvingar í skúladepil.

*Staðseting og heiti*

**§ 2.** Ein skúladepil kann fevna um fleiri skúlabygningar, sum ikki eru samanbygdir, og sum ikki eru á sama matrikli, sama býi, somu bygd ella í somu oyggj.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin gevur einstaka skúladeplinum eitt heiti.

*Ognarviðurskifti í sambandi við samanlegging av útbúgvingarvirksemi*

**§ 3.** Um góðkendur skúli, skipaður sum sjálvsognarstovnur sambært avvarðandi lóggávu fyri skúlan, verður tikin av við tí endamáli at leggja útbúgvingarvirksemi saman sambært § 1, stk. 1, tekur landið yvir allar ognir hjá viðkomandi sjálvsognarstovni, tað veri seg føst ogn, leysafæ, innistandandi, rættindini v.fl. Samstundis tekur landið yvir alla skuld og aðrar skyldur hjá viðkomandi sjálvsognarstovni, har ímillum allar starvsfólkaskyldur, sbr. § 6.

**§. 4.** Tær í § 3, 1. pkt. nevndu ognir skulu sum meginregla nýtast til útbúgvingarendamál og undirvísingarendamál hjá landinum. Møguligt avlop, ið eitt nú stendst av sølu av

ognum í sambandi við yvirtøku av ognum sambært § 3, 1. pkt., fellur til landskassan.

*Setanarviðurskifti og leiðsluviðurskifti*

**§ 5.** Landsstýrismaðurin setir í starv og loysir úr starvi leiðara í skúladepli. Formaðurin í depilsráðnum og annað umboð í depilsráðnum sbr. § 9 er við í setanartilgongdini. Leiðari í einum skúladepli verður nevndur depilsstjóri. Depilsstjórin er ovasti leiðari sambært avvarðandi lóggávu, sbr. § 1, stk. 1, litra a-f.
*Stk. 2.* Depilsstjórin leiðir og býtir arbeiðið, har ímillum uppgávur og ábyrgd.
*Stk. 3.* Depilsstjórin setir í starv og loysir úr starvi undirleiðarar, lærarar og onnur starvsfólk í avvarðandi skúladepli.

**§ 6.** Um útbúgvingarvirksemi verður samanlagt sambært § 1, stk. 1, verða starvsfólkini í avvarðandi útbúgvingarstovnum starvssett í avvarðandi skúladepil, har tey, sum starvsfólk hjá landinum undir leiðslu av depilsstjóranum, varðveita síni rættindi og skyldur sambært galdandi reglum, har ímillum viðkomandi sáttmálum.

*Rakstrarstuðul*

**§ 7.** Rakstrarstuðul til lærlingaundirvísing verður rindaður við 80% frá landskassanum og 20% frá kommununum.
*Stk. 2.* Kommununnar partur av útreiðslunum til lærlingalæruna, smb. stk. 1, verður í fyrsta umfari at leggja út úr landskassanum og síðan býta millum kommunurnar eftir heimstaðnum, ið lærlingarnir høvdu, tá teir byrjaðu skúlan

*Depilsráð*

**§ 8.** Landsstýrismaðurin setir eitt depilsráð fyri ein skúladepil fyri at styrkja samband og samskifti úteftir og dygd og menning inneftir. Depilsráðið skal veita depilsstjóranum ráð og gera tilmæli viðvíkjandi fyriskipan og strategi fyri skúladeplin.
*Stk. 2.* Depilsráðið skal við síni ráðgeving og tilmæli sambært stk. 1 tryggja tað yrkisfakliga virksemið í skúladeplinum, og depilsráðið skal virka fyri, at skúladepilin í størst møguligan mun bjóðar út yrkisfakligar grundútbúgvingar, eftirútbúgvingar og víðariútbúgvingar, sum eru viðkomandi fyri tørvin hjá vinnuni.
*Stk. 3.* Depilsráðið verður heimilað at ráða yvir tí inntøkufíggjaða virkseminum í einum skúladepli, sbr. tó § 11. Depilsráðið skal í tøttum samstarvi við depilsstjóran tryggja, at hetta fer fram sambært galdandi reglum.

**§ 9.** Í depilsráðnum eru sjey limir umframt eitt nemingaumboð, sbr. stk. 3. Landsstýrismaðurin tilnevnir sjey limir og sjey varalimir fyri 4 ár í senn eftir tilmæli sambært stk. 2.
*Stk. 2.* Depilsráðslimir og varalimir verða tilnevndir eftir tilmæli frá hesum pørtum og skulu verða úr upptøkuøkinum hjá skúladeplinum:
1) Viðkomandi yrkisfeløg á arbeiðsmarknaðinum gera tilmæli um tilsamans fýra limir og fýra varalimir við javnstórari umboðan av arbeiðsgevarum og løntakarum.
2) Starvsfólk í deplinum gera tilmæli um tveir limir og tveir varalimir umboðandi ávikavist yrkisútbúgvingarnar og gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar.
3) Føroya Kommunufelag ger tilmæli um ein lim og ein varalim.

*Stk. 3.* Nemingaráðið tilnevnir eitt nemingaumboð, sum kann luttaka á fundum og hava talurætt, men ikki rætt at greiða atkvøðu.
*Stk. 4.* Depilsráðið velur formann og næstformann millum limirnar, sum landsstýrismaðurin hevur tilnevnt. Valið verður avgjørt gjøgnum atkvøðugreiðslu við vanligum meiriluta.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

*Stk. 5.* Teir í stk. 2 tilnevndu persónar skulu tilsamans hava dyggar royndir í leiðslu, fyriskipan og menning umframt gott innlit í føroysk útbúgvingarviðurskifti og samfelagsviðurskifti.

**§ 10.** Depilsstjórin tekur lut á fundum í depilsráðnum og leggur fundarskrá í samráð við formannin. Depilsstjórin hevur talurætt, men ikki rætt at greiða atkvøðu.
*Stk. 2.* Depilsráðið ger starvsskipan fyri virksemi sítt, sum landsstýrismaðurin fær til góðkenningar.

**§ 11.** Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um virksemið hjá depilsráðnum, sambært § 8, stk. 3, val av ráðslimum sambært § 9, stk. 2, og neyvari reglur um uppgávur og ábyrgdir hjá depilsráðnum annars

*Gildiskoma*

**§ 12.** Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**

*Endamál*
Endamálið við uppskotinum er at áseta lógarreglur, sum landsstýrismaðurin skipar skúladeplar eftir.

Ein skúladepil er sambært hesi lóg útbúgvingarstovnur undir einari leiðslu, sum eftir samanlegging av útbúgvingarvirksemi bjóðar útbúgvingar, ið eru nevndar í § 1 í lógini, umframt tær útbúgvingar, sum landsstýrismaðurin í kunngerð kann stovnseta.

*Heitið*
Útbúgvingarnar, talan er um, fara í dag fram á yrkis- og miðnámsskúlunum. Hóast tað, er heitið "skúladepil" valt heldur enn eitt nú "miðnámsskúladepil", ella "yrkis- og miðnámsskúladepil". Orsøkin til tað er, at virksemi á skúlunum er sera fjølbroytt og fatar um nógv annað enn yrkis- og miðnámsútbúgvingar.

*Skúladeplar*
Broytingar eru seinastu árini framdar bæði á gymnasiala miðnáms- og yrkisútbúgvingarøkinum. Skúlaskipanirnar eru í størri mun samskipaðar, samstundis sum miðnámsskúlarnir eru og verða nógv útbýgdir seinastu árini.

Eitt nú verða allir miðnámsskúlarnir í Tórshavn savnaðir í Marknagilsdeplinum, sum eftir ætlan verður klárur at taka í nýtslu í august 2016. Hetta merkir, at alt virksemi hjá Tekniska Skúla í Tórshavn, Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum og Føroya Handilsskúla í Tórshavn fer at húsast í nýggjum og tíðarhóskandi hølum undir sama taki.

Í hinum norðurlondunum, sum vit ofta samanbera okkum við, hava tey í fleiri ár skipað líknandi loysnir, sum nú verða skipaðar í Føroyum. Talan er um loysnir, har ymsu útbúgvingartilboðini til tey ungu verða skipað á sama útbúgvingarstovni. Endamálið við hesum er millum annað at røkka samvirknaðarfyrimunum, har tey, sum virka innan fyri útbúgvingarnar, tað eru lærlingar,

næmingar og lærarar, kunnu síggja seg í einum størri samanhangi, har umstøður eru at læra hvør av øðrum og virka saman. Hóast samvirknaðarfyrimunirnar er hugsjónin tó, at ymsu útbúgvingarnar kortini ikki missa sín egna profil.

Í sambandi við skipan av skúladeplum, er ein av avbjóðingunum, at skúlarnir bygnaðarliga eru skipaðir ymiskt, sum sjálvsognarstovnar ella almennir stovnar. Tekniski Skúlin í Tórshavn og Føroya Handilsskúli eru soleiðis sjálvsognarstovnar meðan Studentaskúlin og HF – skeiðið í Hoydølum er almennur undirvísingarstovnur. Tá nevndu skúlar flyta saman í nýggja skúlabygningin í Marknagili, er ætlanin at skipa virksemi í skúlanum bygnarliga eftir hesi lóg, í ein skúladepil við einari leiðslu.

*Skúladepilin í Marknagili*
Við tað, at lógin ikki ásetir neyvt, hvørjir almennu skúladeplarnir verða, er skúladepilin í Marknagili í viðmerkingunum nýttur sum gott dømi um skúladepil, sum verður skipaður.

Í 2008 varð avtala gjørd millum Mentamálaráðið og ávikavist stýrið fyri sjálvsognarstovnin Tekniska Skúla í Tórshavn og stýrið fyri Føroya Handilsskúla um ognarviðurskiftini í sambandi við Marknagilsdepilin. Sambært avtaluni fella ognirnar hjá nevndu sjálvsognarstovnum til landið á sumri í 2016, tá nýggi skúlin í Marknagili eftir ætlan verður tikin í nýtslu.

Í 2013 varð farið undir at byggja skúlan og í desember sama ár varð sett nevnd at gera tilmæli um at skipa bygnaðin í nýggja deplinum. Í arbeiðssetninginum varð nevndin biðin um at gera uppskot um, hvussu Markagilsdepilin kann skipast sum almennur stovnur við einari og somu leiðslu undir Mentamálaráðnum, har tað verður tryggjað vinnuni ávirkan á serliga tað yrkisfakliga virksemið í skúlanum. Álitið frá nevndini varð handað landsstýrismanninum tann 5. juni 2014. Mælt var til at gera eina almenna depilslóg, ið umframt Marknagilsdepilin kann fevna um aðrar møguligar deplar, ið kunnu verða settir á stovn í framtíðini.

Í sambandi við, at farið var undir at skipa Marknagilsdeplin varð avtalað við stýrini, at tey skjótast gjørligt skuldu fara undir at avtaka sjálvognarstovnarnar og at lata ognirnar samsvarandi viðtøkunum til undirvísingarendamál hjá landinum. Tá ið henda lógin kemur í gildi, verður bygnaðurin við Marknagil skipaður soleiðis, at eitt depilsráð, sum er lýst í lógini, verður skipað. Depilsráðið skal ráðgeva og geva tilmæli til depilsstjóran viðvíkjandi tí yrkisfakliga partinum. Omanfyri nevnda depilsráð skal eftir ætlan hava ræðisrætt yvir inntøkufíggjaða virkseminum á deplinum. Eftir ætlan flytir verandi útbúgvingarvirksemi í Tórshavn í nýggju hølini við Marknagil tann 1. august 2016.

*Samstarv við vinnuna*
Tað er ein sannroynd, at samstarv við vinnuna um útbúgving og serstakliga samstarvið um tann yrkisfakliga útbúgvingarpartin hevur havt avgerandi týdning fyri samfelagsligu og búskaparligu menningina. Sæð í søguligum høpi hevur vinnusamstarvið gagnað tí einstaka yrkinum og lyft fakini upp á neyðug dygdarstig. Samstarvið hevur somuleiðis gagnað tí einstaka næminginum í hansara egnu menning. Tí er neyðugt at varðveita hetta samband við vinnuna, og at leggja samskifti í fastar karmar.

*Depilsráð*

Í dag hevur vinnan stóra ávirkan á yrkisfakliga virksemið gjøgnum stýrini á sjálvsognarstovnunum, yrkisútbúgvingarráðið og yrkisútbúgvingarnevndina sambært yrkisútbúgvingarlóggávuni, men við hesi lógini verður vinnuni harumframt tryggjað ávirkan á yrkisfakliga virksemið í skúladeplum umvegis depilsráðið, sum skal gera tilmæli til depilsstjóran hesum viðvíkjandi.

Depilsráðið skal eisini saman við depilsstjóranum og leiðsluni gera langtíðarætlanir fyri skúladepilin, sum setir í kortið, hvagar leiðin skal ganga, og hvussu komið verður á mál. Depilsráðið skal virka fyri ítøkiligum samskifti og samstarvi við vinnuligt, útbúgvingarligt og annað virksemi uttan fyri stovnin. Eisini skal depilsráðið virka fyri dygd og menning inneftir í skúladeplinum.

Yrkisfakligu útbúgvingarnar verða í stóran mun skipaðar í einum samstarvi við vinnuna, har ein partur av útbúgvingini er inni í skúlanum og ein partur er úti í vinnuni. Tað er umráðandi, at góða sambandið, sum hevur verið millum vinnu og skúla, undir yrkisskúlaskipanini verður varðveitt í skipanini við skúladeplum.

Depilsráðið fær líknandi heimildir, sum stýrini í yrkisskúlunum høvdu, tá ræður um skeiðs- og eftirútbúgvingarvirksemi, ið er fíggjað við inntøkum og ikki úr landskassanum. Depilsráðið verður heimilað at ráða yvir inntøkufíggjaða virkseminum í skúladeplinum og skal í tøttum samstarvi við depilsstjóran tryggja, at hetta fer fram sambært galdandi reglum hjá landinum. Mett verður, at hesin parturin av virkseminum í skúladeplinum er at rokna sum fremmand fígging í landsroknskaparligum høpi, soleiðis at møguligt avlop kann førast yvir um ár. Hesin spurningur skal avklárast ítøkiliga saman við Fíggjarmálaráðnum. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um inntøkufíggjaða virksemi í skúladeplum.

*Aðrir skúladeplar*
Í sambandi við at sjálvsognarstovnurin Føroya Handilsskúli ikki heldur fram sambært avtalu millum partarnar, verður virksemið hjá handilsskúlanum á Kambsdali og í Tórshavn loyst bygnaðarliga frá hvørjum øðrum. Handilsskúlin á Kambsdali verður eftir ætlan skipaður saman við grannanum á Kambsdali, Studentaskúlanum og HF-skeiðnum.

Í tilgongdini at smíða lógina hevur samskiftið verið við leiðslur á miðnámsskúlunum í Tórshavn og bæði stýrini fyri sjálvsognarstovnarnar fyri Føroya Handilsskúla og Tekniska Skúlan í Tórshavn. Samskiftið hevur eisini verið við leiðslurnar á miðnámsskúlunum á Kambsdali og leiðslu og stýrið fyri Tekniska Skúlan í Klaksvík.

Út frá hesum samskifti verður mett, at fyriliggjandi lóg er nøktandi grundarlag at skipa møguligar framtíðar skúladeplar eftir.

Sum áður nevnt ásetir lógin ikki neyvt, hvørjir yrkis- og miðnámsskúlar skulu skipast í skúladeplar. Lógin ásetir heldur ikki talið á skúladeplum. Heldur verður lagt upp til, at landsstýrismaðurin í samskifti við yrkis- og miðnámsskúlarnar skipar skúladeplar har tað kann verða næmingum, lærarum og útbúgvingarverkinum sum heild til fyrimunar.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

**Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar**
Uppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar og búskaparligar avleiðingar fyri land ella vinnu.

**Umsitingarligar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar.

**Umhvørvisligar avleiðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær umhvørvisligar avleiðingar.

**Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

**Sosialar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

## Kap. 3. Serligar viðmerkingar

*Til § 1*
Ásetingin viðvíkur allýsingina av einum skúladepli, ið verður mett at vera av týdningi í sambandi við at skilmarka nýtsluøki lógarinnar, tí tað knýta seg materiellir rættarvirkningar til almennar skúladeplar sambært hesi lóg eitt nú, hvat viðvíkur leiðsluviðurskiftum, rakstrarstuðli og

depilsráð. Allýsingin hevur til endamáls at nágreina, at yrkisskúlalógin ikki er galdandi fyri skúladeplar og at skilmarka depilslógina í mun til yrkisskúlalógina, tí skúladeplar er eitt sjálvstøðugt hugtak í mun til yrkisskúlar, har yrkisskúlar sambært yrkisskúlalógini verða skipaðir sum sjálvsognarstovnur sambært § 3, stk. 1, 2. pkt, 1. lið við einum stýri sum ovasta leiðsla, hóast skúladeplar eftir ætlan fara at bjóða út yrkisútbúgvingar.

Sum tað er orðað í lógartekstinum, gerst talan um ein almennan skúladepil, tá ið útbúgvingar sambært teimum í litra a-f nevndu løgtingslógum verða lagdar saman í ein almennan útbúgvingarstovn undir leiðslu av depilsstjóranum. Havast skal í huga, at gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar eru skipaðar við seks útbúgvingarbreytum, har hvør teirra sambært hesi lóg verður mett at vera ein útbúgving. Sum ein onnur treyt skal talan vera um eina samanlegging (fusión) av útbúgvingum, t.v.s., at landsstýrismaðurin á virknan hátt skal hava lagt útbúgvingar á undirvísingarstovnum, ið áður hava virkað sum sjálvstøðugir stovnar undir sjálvstøðugari leiðslu, undir eina og somu leiðslu av depilsstjóranum, sbr. tilvísingina til § 5, stk. 1.

Umframt tær í § 1, stk. 1, litra a-f nevndu útbúgvingarlógir verður tað við hesi lóg í § 1, stk. 2 heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at leggja aðrar enn tær nevndu útbúgvingar í almennan miðnámsskúladepil.

*Til § 2*
Ein skúladepil kann fevna um virksemi í einum skúlabygningi. Skúladepilin kann eisini fevna um virksemi í fleiri skúlabygningum, sum ikki eru samanbygdir ella sum ikki eru staðsettir á sama matrikli. Ein skúladepil kann eisini fevna um skúlar, sum ikki eru í sama býi, bygd ella oyggj. Depilsstjórin skipar leiðslubygnaðin, umsitingarliga virksemið og undirvísingarvirksemið í skúladeplinum.

Ein skúladepil skal hava eitt navn, ið virkar sum sambinding millum skúlan og borgaran.

*Til § 3*
Um ein yrkisskúli, sum er skipaður sum sjálvsognarstovnur, avtekur seg sjálvan sambært viðtøkunum, tí stýrið og landsstýrismaðurin eru farin undir eina tilgongd at skipa útbúgvingarvirksemi í ein almennan skúladepil, fella ognir og skyldur hjá avvarðandi sjálvsgonarstovni til landið. Í sambandi við Marknagilsdepilin verða avtalur gjørdar við stýrini um avtøku.

Av tí at talan er um sjálvsognarstovnar við eginogn, og ásetingin á ein hátt kann sigast at ávirka ræðisrættin hjá sjálvsognarstovnum til at ráða yvir sínum ognum í sambandi við avtøku, hava ávísir løgfrøðiligir spurningar stungið seg upp í mun til ognarrættin. Vísast skal til “Álit um bygnaðin í Skúladeplinum við Marknagil”, ið var handað landsstýrismanninum tann 5. juni 2014. Í álitinum verða eitt nú týðandi Hægstarættardómar lýstir, sbr. UfR2004.2661H viðvíkjandi spurninginum um ognartøku í sambandi við lov nr. 474 af 31.05.2000 om Københavns Havn og UfR1994.29H um privatiseringlógina í Danmark. Sambært UfR2004.2661H tala nøkur avgerandi viðurskifti ímóti ognartøku, tá ið talan er um sjálvsognarstovnar, ið *de facto* eru almennir stovnar, t.v.s., at teir eru at meta sum partur av almennu fyrisitingini, hóast lógin sigur, at teir eru sjálvsognarstovnar.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Slíkir sjálvsognarstovnar eru fevndir av ognarrættinum. Tó eru slíkir sjálvsognarstovnar ikki serliga væl vardir móti almennum inntrivum í ognarviðurskiftini, tí teir eru at meta sum serligar fyrisitingarligar eindir, ið innganga sum partur av almennu fyrisitingini.

Hóast yrkisskúlarnir í Føroyum eru skipaðir sum sjálvsognarstovnar sambært § 3, stk. 1, 2. pkt. 1. lið í yrkisskúlalógini, útinna teir eitt lógarskipað ment atkomuligt útbúgvingartilboð, ið tænir týðandi almennum samfelagsáhugamálum.

Yrkisskúlarnir standa á fíggjarlógini, og teir eru fevndir av fyrisitingarrættinum. Harumframt eru yrkisskúlarnir fevndir av almenna setanarpolitikkinum og almennum roknskaparreglum. Teir eru undir eftirliti av landsstýrismanninum, og landsstýrismaðurin hevur ávirkan á dagliga raksturin á stovninum. Eitt nú kann nevnast, at landsstýrismaðurin setir stjóran og loysir stjóran úr starvi eftir tilmæli frá stýrinum, og landsstýrismaðurin tilnevnir stýrisformannin.

Landsstýrismaðurin skal góðkenna viðtøkurnar fyri stovnin, og landsstýrismaðurin hevur heimild undir ávísum umstøðum at taka stýrið av ræði. Landið hevur fíggjað bygningarnar, og keyp og søla av hesum kann ikki fara fram uttan góðkenning frá landsstýrismanninum.

Vísandi til omanfyri standandi viðurskifti er tað neyvan í stríð við ognarrættin, at landið yvirtekur ognir v.m. hjá avvarðandi sjálvsognarstovni, um hesir avtaka seg sjálvar við tí lógarásetta endamáli at leggja virksemið í ein almennan skúladepil undir einari leiðslu.

*Til § 4*
Ognirnar sambært § 3 skulu brúkast til útbúgvingar- og undirvísingarendamál hjá landinum. Møguligt avlop, ið stendst av sølu av slíkum ognum, fellur til landskassan. Slíkt inntriv verður ikki mett at vera í stríð við ognarrættin, sbr. UfR2004.2661H, har Hægstirættur úttalaði:

*”Det må således lægges til grund, at Københavns havn forud for gennemførelsen af lov nr. 474 af 31.maj 2000 om Københavns Havn A/S var en selvejende institution inden for den statslige forvaltning. Højesteret finder, at dette indebærer, at Københavns Havn vel var et selvstændigt retssubjekt med egen formue, men – netop fordi den indgik i den statslige forvaltning – ikke nød samme beskyttelse som en privat (”ægte”) selvejende institution over for indgreb fra statsmagtens (lovgiverens) side i form af nedlæggelse eller omorganisering.*
*På denne baggrund finder Højesteret, at Folketinget ikke har tilsidesat grundlovens § 73 ved at vedtage en omorganisering af Københavns Havn forhold, som indebærer, at institutionens aktiver og passiver overtages af et aktieselskab, hvis aktier ejes af staten. Dette gælder selv om et af formålene med denne omorganisering var at overføre en del af institutionens kapital til statskassen.”*

Tað avgerandi fyri, at ein lóg sum henda ikki er í stríð við ognarrættin er, at avvarðandi sjálvsognarstovnar eru partur av almennu fyrisitingini, sbr. annars viðmerking til § 3 omanfyri.

*Til § 5*
Depilsstjórin vísir beinleiðis til landsstýrismannin, og leiðir og býtir arbeiðið í einum skúladepli sambært vanliga leiðslurættinum. Depilsstjórin kann skipa deildir í skúladeplinum, t.d. seta deildarleiðarar og lata (delegera) uppgávur til síni starvsfólk. Depilsstjórin hevur ta yvirskipaðu

ábyrgdina av stovninum. Depilsstjórin setir sjálvir sínar leiðarar og starvsfólk, og hann kann eisini lata (delegera) hesa kompetansuna til sínar undirleiðarar uttan so, at talan kann gerast um eitt sokallað delegatiónsforboð sambært materiellari útbúgvingarlóg. Formaðurin og annað umboð fyri depilsráðið sambært §§ 8-10 skulu vera við í setanartilgongdini, tá ið depilsstjóri verður settur. Hetta merkir í praksis, at formaðurin og annað umboð fyri depilsráðið sambært almenna setanarpolitikkinum skal vera við í setanarbólkinum, ið ger tilmæli til landsstýrismannin um setan av depilsstjóra.

*Til § 6*

Landið yvirtekur allar skyldur hjá avvarðandi stovnum, har ímillum allar starvsfólkaskyldur, har hesi varðveita síni rættindini og skyldur sambært avvarðandi sáttmálum undir ovastu leiðslu av depilsstjóranum. Starvsfólkini verða ikki verri stillað, hóast tey vera til starvsfólk hjá landinum. Landið traðkar inn í allar tær starvsfólkaskyldur, ið eitt nú ein sjálvsoganrstovnur hevur bundið seg til áðrenn avtøkuna.

*Til § 7*

Tað fíggjarliga kravið upp á stuðul, sum yrkisskúlar hava til lærlingaundirvísingina mótvegis kommununum sambært § 13, stk. 2 í yrkisskúlalógini, stendur við óbroytt, tá ið lærlingaundirvísingin verður skipað í einum skúladepli.

*Til § 8*

Tað er ein sannroynd, at samstarv við vinnuna um útbúgving og serstakliga samstarvið um tann yrkisfakliga útbúgvingarpartin hevur havt avgerandi týdning fyri samfelagsligu og búskaparligu menningina. Sæð í søguligum høpi hevur vinnusamstarvið gagnað tí einstaka yrkinum og lyft fakini upp á neyðug dygdarstig. Samstarvið hevur somuleiðis gagnað tí einstaka næminginum í hansara egnu menning. Tí er neyðugt at varðveita hetta samband og leggja samskifti í fastar karmar.

Í dag hevur vinnan stóra ávirkan á yrkisfakliga virksemið gjøgnum yrkisútbúgvingarráðið og yrkisútbúgvingarnevndina sambært yrkisútbúgvingarlóggávuni, men við hesi lógini verður vinnuni harumframt tryggjað ávirkan á yrkisfakliga virksemið í skúladeplum umvegis depilsráðið, sum skal gera tilmæli til depilsstjóran hesum viðvíkjandi.

Depilsráðið skal harumframt saman við depilsstjóranum og leiðsluni gera langtíðarætlanir fyri skúladepilin, sum vísir, hvagar leiðin skal ganga, og hvussu komið verður á mál. Depilsráðið skal virka fyri ítøkiligum samskifti og samstarvi við vinnuligt, útbúgvingarligt og annað virksemi uttan fyri stovnin. Eisini skal depilsráðið virka fyri dygd og menning inneftir í skúladeplinum.

Yrkisfakligu útbúgvingarnar verða í stóran mun skipaðar í einum samstarvi við vinnuna, har ein partur av útbúgvingini er inni í skúlanum og ein partur er úti í vinnuni. Tað er umráðandi, at góða sambandið, sum hevur verið millum vinnu og skúla, undir yrkisskúlaskipanini verður varðveitt í skipanini við skúladeplum.

Depilsráðið fær líknandi heimildir, sum stýrini í yrkisskúlunum høvdu, tá ræður um skeiðs- og eftirútbúgvingarvirksemi, ið er fíggjað við inntøkum og ikki úr landskassanum. Depilsráðið verður heimilað at ráða yvir inntøkufíggjaða virkseminum í skúladeplinum og skal í tøttum

samstarvi við depilsstjóran tryggja, at hetta fer fram sambært galdandi reglum hjá landinum. Mett verður, at hesin parturin av virkseminum í skúladeplinum er at rokna sum fremmand fígging í landsroknskaparligum høpi, soleiðis at møguligt avlop kann førast yvir um ár. Hesin spurningur skal avklárast ítøkiliga saman við Fíggjarmálaráðnum. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um inntøkufíggjaða virksemi í skúladeplum.

*Til § 9*
Depilsráðið er mannað við 7 limum, sum allir skulu at hava sítt virksemi í upptøkuøkinum hjá skúladeplinum fyri at tryggja sambandið millum skúladepilin og nærumhvørvið. Upptøkuøkið sambært hesari lógini skal vera tað sama sum upptøkuøkið er sambært § 25 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, har upptøkuøki B fevnir um Norðoyggjar, Eysturoy og tann partin av Sunda kommunu, sum liggur á Streymoynni, sum í dag er Hósvík og bygdirnar á Streymoynni norðanfyri Hósvík. Restin av landinum kemur undir upptøkuøki A.

Ásett er, at viðkomandi yrkisfeløg á arbeiðsmarknaðinum gera tilmæli um tilsamans 4 limir og fýra varalimir við javnstórari umboðan fyri arbeiðsgevarar og løntakarar. Vinnuumboðanin líknar tí, sum hevur verið í stýrunum á yrkisskúlunum. Starvsfólk á skúladeplinum tilnevna tveir limir og tveir varalimir, sum umboða tær báðar høvuðsgreinarnar av útbúgvingarleiðum, sum eru tær yrkisfakligu og tær gymnasialu. Føroya Kommunufelag velur eitt umboð í depilsráðið. Fyri kommunala umboðið er ásett, at lokal atlit skulu takast, tá hesir verða valdir. Hetta soleiðis at gott samband er við nærøki hjá skúladeplinum. Í depilsráðnum hava umboð fyri næmingarnar í deplinum eisini rætt at luttaka og skulu hava alt fundartilfar. Umboðið hevur talurætt, men ikki atkvøðurætt í depilsráðnum. Depilsráðið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni millum limirnar, sum hava atkvøðurætt.

Tað er umráðandi, at depilráðið arbeiðir strategiskt í síni tilgongd. Ásett er um førleikarnar hjá tilnevndu persónunum, at teir tilsamans skulu hava dyggar royndir í leiðslu, fyriskipan og menning umframt gott innlit í føroysk útbúgvingarviðurskifti og samfelagsviðurskifti.

Staðsetingin og samansetingin av depilsráðnum ovast í stovnsbygnaðinum, undir liðini av depilsstjóranum, avspeglar eitt ynski um at stuðla yrkisfakliga virkseminum. Í skúladeplinum kemur at verða ein stór yvirvág í næminga- og lærarataliunum innan tær gymnasialu útbúgvingarnar. Depilsráðið kemur í ein ávísan mun at viga upp imóti hesum og geva yrkisútbúgvingunum meiri uppmerksemi.

*Til § 10*
Depilsstjórin luttekur og er við til at fyriskipa fundirnar í depilsráðnum saman við formanninum. Skrá skal leggjast fyri fundin, og depilsstjórin skal syrgja fyri, at fundarfrásøgn verður skrivað.

Depilsráðið ger eina meiri ítøkiliga starvsskipan fyri, hvussu arbeiðið í depilsráðnum er skipað og fær landsstýrismaðurin hesa til góðkenningar. Regluligir fundir í depilsráðnum í einum skúlaári eiga í minsta lagi at verða einaferð um árfjórðingin. Tó kunnu smærri frávik koma fyri.

*Til § 11*

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglar um tað intøkufíggjaða virksemi, og hvussu depilsráðslimirnir verða valdir og um uppgávur og ábyrgdir hjá depilsráðnum annars.

*Til § 12*
Áseting um gildiskomu.

Mentamálaráðið, xx. februar 2015

Bjørn Kalsø
landsstýrismaður

/Poul Geert Hansen

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo